# ALMANNASTOVAN OG FØROYA STUDENTASKÚLI OG HF-SKEIÐ

Søkt verður eftir 2 hjálparum til 45 tímar **aðru hvørja viku** til eina rørslutarnaða gentu, sum gongur í 2 g. í Studentaskúlanum.

Almannastovan og Føroya Studentarskúli arbeiða saman um stuðulstiltakið. Tey, ið sett verða, koma at arbeiða bæði í skúlanum og uttanfyri skúlatíð.

**Arbeiðsuppgávurnar eru:**
- At vera fylgjari til og frá skúla
- Praktiskur hjálpari í skúlanum
- Fylgjari til venjingar, frítíðartiltøk o.a.

**Førleikakrøv**
- tolsemi
- samstarvsvilja
- og ansni fyri at verða hjálpari hjá næmingi í einum skúlaflokki
- krav er, at tann, ið settur verður hevur koyrikort

Arbeiðistíðin byrjar skúladag kl. 7.30

Setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag

Nærri upplysningar um størvini fáast við at venda sær til Almannastovuna, Edith Due Sørensen serráðgevi, tlf. 35 35 10 gerandisdagar millum kl. 9.00 og 15.00 ella til Mads A. Winther, rektari á Studentarskúlanum tlf nr. 28 46 13

Umsókn saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Almannastovuni, Smyrilsveg 20, postboks 30 966, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 31. juli 2005.

**Almannastovan**
**Føroya Studentaskúli og HF- Skeið**

# Útbjóðing av reingerð

Sunda kommuna bjóðar hervið reingerðina av nýggja dagstovninum á Oyrarbakka út. Stovnurin er 1035 m$^2$. Reingerðin skal lúka treytirnar fyri grønt umhvørvi.

Útboðstilfar fæst við at venda sær til kommunuskrivstovuna:
**Sunda kommuna**
Oyrarbakkavegur 3 · 400 Oyrarbakki
tlf. 471020 · Fax. 471021
Mail: sunda@sunda.fo

Tilboðini merkt »Dagstovnur reingerð« skulu vera kommununi í hendi tann 22. juli 2005.

Tilboðini verða latin upp á kommunuskrivstovuni tann 25. juli 2005 kl. 14.00.

# Lærari til Skálavíkar skúla

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2005/2006.

1 starv uml. 9 tímar vegna avlopstímar.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 27. juli 2005.

**Skálavíkar Skúlastýri**
v/ Elsa Mariu Hentze
FO-220 Skálavík

**Sjóbjargingarstøðin**
**MRCC-Tórshavn**
Tlf: +298 351300 • Fax: +298 351301
Telex: 81200 TLGR FA
Inmarsat C: 423 116210 • Inmarsat B: 323 116220 (voice)
323 116221 (Fax)

# Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður, at seismiskar kanningar verða gjørdar á hesari havleið.

| | |
|---|---|
| 1. Útnyrðingshornið | 63º20' N 000º24' W |
| 2. Landnyrðingshornið | Eystur ímóti markinum frá pos 1. |
| 3. Landsynningshornið | Eystur ímóti markinum frá pos 4. |
| 4. Útsynningshornið | 60º40' N 005º00' W |

Felagið Western Geco kannar økið.
Kanningarnar verða gjørdar vegna Chevron Texaco.

| | |
|---|---|
| Byrjað verður umleið | 15-07-2005 |
| Arbeiðið tekur væntandi | 60 dagar |
| Skipanavn | Western Pride |
| Kallibókstavir/Flagg | 3EYQ8 / Panama |
| Fiskiveiðiumboð | Magni Skaale |

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um kanningararbeiði fáast frá Tórshavn Radio, á telefon 351300, ella á telefax 351301.

Eisini verður víst til heimasíðuna www.mrcc.fo.

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

# Portørur

Søkt verður eftir einum sjúkrahúsarbeiðara (portøri) til setan frá 15. august 2005.

Umframt vanligt portørarbeiði og koyring við sjúkrabili, umfatar starvið eisini alt fyrifallandi inni- og útiarbeiði. Talan er um fulltíðarstarv við tilkallivakt frá heiminum.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Lønardeildina, Bent Albinus tlf. 371133 lokal 141.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðsmannafelag og Fíggjarmálaráðið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

**Suðuroyar Sjúkrahús**
umsjónarmaðurin
Postsmoga 51
800 Tvøroyri

Umsóknarfreistin er 1. august 2005.

# Summarfestivalurin 2005

**Tey ið ynskja at hava útsølur o.a. á Summarfestivalinum, kunnu senda umsókn til:**

**NFÍ**
**Postboks 308**
**700 Klaksvík**

**ella á teldupost nfi@email.fo**

**seinast 18. juli 2005**

**NFÍ**

# Summarfrí

Vegna summarfrí er Sjúkrakassin stongdur frá 18. juli til 1. august 2005.

Havnar Sjúkrakassi

**Havnar Sjúkrakassi**

# Bakaralærlingur

Okkum tørvar ein raskan bakaralærling. Hevur hettar tín áhuga, so ring og spyr eftir Jóhan B. Vilhelmsen.
Ring ella skriva til:

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13 · Postsmoga 41
110 Tórshavn · Tlf. 31 10 60

frants restorff

-so eru tit við!